Í Góðadali triðja jólamorgun 1983

Alexandur Abrahamsen Øre á Hálsi

HUGLEIÐINGAR
Frits Johannesen

Arnold Øre, Fuglafjørður, var røktingarmaður í Góðadali ein mansaldur. Hann varð valdur til røktingarmann í 1946 og røktaði til sín doyggjandi dag. Hann doyði 1. mars 1995, sjeyti trý ára gamal. Hann var ein sjaldsamur maður í mangar mátar. Seyður var hansara eitt og alt. Uppi í Bakkageilini í Fuglafirði var seyðahúsið hjá Øra-monnunum. Her varð mangan sitið skýming. Menn stukku inn á gólvið, sum høvdu áhuga fyri seyði - talaðu um seyð, seyðarøkt og søgdu sínar seyðasøgur. Hugfarsligt var at sita undir bitunum uppi undir Deyðseyðagilinum við einum heitum kaffidussi og hoyra hesar menn siga frá. Søgurnar vóru nógvar, og áhugavert hevði tað verið, um søgurnar vórðu savnaðar í ein bókling, so hesin parturin av bygdasøguni varð varðveittur. Tað er so nógv, sum fer fyri skeyti, sum vit halda vera natúrligt og livir á fólkamunni, men ein dag er tað farið — farið í gloymskunnar hav og horvið med alla. Soleiðis er, og tykist mær, at henda gamla mentanin hevur havt frægari dagar enn nú, tá ið hugsað verður um at ganga á fjall og røkta. Ja, ymsar eru hesar frásagnirnar og hevur hvør bygdin sína søgur um seyð og seyðarøkt, og tær eru ikki so fáar.

Arnold var sonur Malenu Kristinu og Jógvan Øre. Jógvan Øre var ættaður úr Gøtu, sonur Johan Øre (Uppi í Oyri) og Elina, sum var ættað av Brúnni. Malena var dóttir til Elin og Hans Klein. Elin (kona Hans Klein) var ættað av Hellunum dóttir Lamba Símun og Marin Margrethu. Tey vóru tey næstu hjúnini, ið settu seg niður á Hellunum. Elin var langabbasystir mín, sostatt vóru vit skyldmenn, vit báðir Arnold og eg.

TAÐ, SUM RANN FRAM fyri meg nú, var triði jólamorgun í 1983. Mær untist at ganga á fjall við hesum manni eini 30 ár, og vóru tað góðir dagar. Tann løtan er ikki ring, sum er góð og er nú eftirsjóð frá hesum døgum í hugans heimi. Ein ávísur innsúður frá einum degi, sum var so hvønndagsligur, men tó bar eitt rin av einum halgidegi við sær. Løturnar vóru ikki so fáar í hesum megnar katedrali, sum rakk av Nestanga heim í Ryskin, suður undir Oynna, Rustina og niðan undir Røkur, Háls og Mjóstýggj. Ikki var nakar gotiskur kirkjubygningur um tann víða heim so tignarligur sum Góðadalur. Nei, ikki mær vitandi og sigast skal eisini, at Góðadalur telist millum breiðastu dalar í Føroyum.

Arnold segði ikki nógv, og sigast kann: Harri ert tú yvir tí ótalaða orðinum. At vera fáorðaður nýtist ikki at bera tað við sær, at hann ikki kom fram við sínum. Nei, skilamenn hava hetta yvir sær, at verður talað, stendur tað eftir. Tá ið Arnold talaði, var tað av lívsroyndum. Hann visti nógv um seyð og at koma til skýmingarløtuna uppi í seyðahúsinum vóru skyggingar, sum hevði nógv við okkara gomlu mentan at gera.

Alexandur Abrahamsen røktaði til hann doyði í 1980. Arnold og Alexandur røktaðu henda haga, sum onnur røktaðu sín egna urtagarð. Teir bóru Góðadalsheimin við sær, har teir vóru. Onkur kundi sagt, at teir vóru natúrfólk, og hví ikki tað? Hví verður farið inn í frumskógin ella á glerstoyttar ísfløtur at leita eftir frumfólki? Tað er óneyðugt. Fólk, sum liva tætt at natúruni, hava hetta sinniliga við sær, at tey eru eitt við natúruna, og hava kent hetta ljóð frá barnsbeini av og kunnu tí teljast ímillum teirra, ið eru natúrfólk.

GÓÐADALUR er ein eiggiligur katedralur, og aldri havi eg sæð hann so tignarligan sum triðja jólamorgun 1983. Alexandur og Arnold søgdu altíð, at seyðurin skuldi hava tað gott um jólini, tí varð altíð farið yvirum upp undir jól at grava út úr bólunum, rættini og húsinum á Enninum. Hetta var eisini meiningin 1983, men var so nógvur skyggjísur, at tað var sum á kalvabaki, og var ringt at koma niður av Hálsi. Har legst altíð so nógvur skalvur, og í Smørstíggi var skyggjandi bláísur. Høgt varð í fleiri dagar, men ikki náddu vit niður á slætt, so støðan var tann um jóltíðir, at seyðurin fekk ikki tað jólahald, sum hann átti at havt, og hugsi eg, at Arnold ikki kendi nakran frið á sær um jólini, hóast orðini um frið og góðan tokka ljóðaðu víða um í orðum, sangi og tónleiki.

Arnold var raskur maður, treystur og sterkur, og tók hann eingi óráð fyri. Hann vildi altíð hava fast undir føti, tá ið farast skuldi niður av Smørstýggj, tí varð farið dag um dag at nartla burtur av íslindunum, sum næstan høvdu fest røtur í ta hørðu helluna. Ísurin er ikki so lættur at hava við at gera, tá ið hann liggur skerpið fastur at helluni. Hugsaði um Grønlandsísin, sum í fleiri hundrað ár hevur ligið undir fargi, hvussu fastur, tættur og harður tann ísurin mundi vera, tá ið skriðjøkulin kálvar og fer í havið. Hesin elli gamli ísstólpin fer sína leið til undirgangs. Tað tinar burtur av honum á víðum havi, hóast sína glarglitrandi klædnadrakt, sum kann skera í stál, men má lúta fyri hitanum, ja, bert nøkrum fáum hitastigum. Tá ið ísurin í Smørstýggj var so beinharður, hvussu hevði tað verið at høgt í Grønlandsísin? Lítið nyttar krákunev og íshaki til henda stálkynda ís. Nei, ilt er at gera við. Kanska er tað einans hitin við síni hóvligu framferð, ið setir merki í hesar flótandi ísbular.

Eftir at hava grivið og høgt tann líði langa Tollaksmessudag, máttu vit sanna, at her gjørdist einki og avráddu vit at fara triðja jólamorgun yvir aftur á Góðadal snimma á morgni at royna. Ikki var so nógv eftir at grava, so vit fóru óivað at klára at tevsa síðsta pettið, áðrenn komið var niður á slætt.

TRIÐJA JÓLAMORGUN um sjey tíðina fóru tveir mans tenjandi niðan um Rossarygg. Reyði roðin um Lorvíksfjall spann mynstruttan bul av purpurreyðum, grønligum, bláligum og korkalittum frumljósi úr tí djúpu havsbrúnni og løgdu seg í íshamrarnar víða um á fjallagreinunum. Stjørnurnar glampaðu á tí rodnandi himinum og søgdu sínar stuttligu jólasøgur um mannalótir um høgtíðina og um tveir røtingarmenn, sum ikki komu niður í tann breiða dalin fyri jól, har kavafløtan var so hvít sum ljósasta mjøll.

Onkur jólamaður gekk á illum niðri í bygdini. Ein troytt sál, sum royndi at leita upp hús, sang tað síðstu linjuna av jólasálminum: Teir heilagu kongarnir. Hesin einligi jólasveinurin hevði óivað havt gott blóð um høgtíðina, og nú fjarðaði rúsurin út, og gav hetta seg til kennar í einum jólasálmi. Tann síðsti neistin frá eini høgtíð legði seg til hvíldar í eini troyttari jólasál, sum nú mett av halguni leitaði upp hús og kreyp undir rekkjuvágina fyri at sova sær megi til nýggjárið.

Ovast uppi vóru tveir seyðamenn á veg út á eina mark, sum ikki kendi sín líka í hesi verøld. Upp um Botnsbrúgv og niðan á Háls lá leiðin. Av og á datt onkur setningur um tanngarðarnar. Arnold tosaði um, at var frost á Traðarbrekkuni, komst tú ikki niður í Góðadal. (Traðarbrekkan er beint niðanvert fótbóltsvøllin.) Var tátt undir Gøtueiði, slapst niður, men var kavað í bakka, bar ikki bøtur. Tá kundi tú bara hylja upp um høvur og leggja teg á hina síðuna og droyma um Góðadal.

TÁ IÐ VIT RUKKU niðan á Háls, lá dalurin fyri føturnar. Rustakambur var sum ein bulmikil hvalur, sum floytti sær í tí stillu hvirruni. Dalurin var eins og nýkaraður lagdur. Lá á gólvinum og seig purpurlittta morgunljósið í seg. Tað dimbláa lýsið í Djúpinum kráaði sína morgunoverturu í einum elligomlum duri, ið bara fanst her. Eitt tónalag av urljóði í streymjagarum, íðukálvum, fekk fastatøkur á vestfalsbroddinum, tá ið hann stóð høgt. Kallsoyggin lá sum ein flotoyggj við sínum bulmikla kroppi og jótraði í sólarenningini. Tindarnir kemdu tí køldu kyldini, ið streyk fram við røkur og líðir. Tað var triði jólamorgun, sum stóð ritaður í teir gráu hamrarnar á eystursíðuni á Kalsoynni.. Fóru niður ígjøgnum Smørstýggj og tóku setningin upp aftur, sum sleptur var Tollaksmessudag. Alt tað góða, sum farið varð niður um um jólini, gav tær megi og mátt at høgga, til komið varð oman á slætt.

Nú stóðu vit umgyrdir av fjallaveggum og fjallarøðum. Fjallasúlurnar goymdu at einum fornisk- um guddómi settur í stýggjar, røkur og urðargrót. Góðadalskatedralurin var ikki sum verst at gesta triðja jóladag. Vit løgdu amboðini til síðis og fóru til gongu suðureftir. Húsið á Enninum var tað fyrsta, sum farið varð inn í. Seyðurin, ið lá við hetta bólið, var altíð so krillutur. Tá ið hann krokaði her, sveittaði klædningurin so mikið, at tað drippaði niður yvir seyðin, tí var hann altíð so vátur og hevði ringar krillur. Ennihúsið fór í einum stormi í januar 1984, og glaður var Arnold. Húsið munti lítið sum skýli hjá seyðinum. Seyðurin var altíð betur fyri, ið støðaðist við tey aldargomlu bólini.

KÁLVASLÆTTI var ein vøkur fløta henda morgun. Alt var sum eitt hvítt teppi, slept úr erva yvir henda prýðiliga fløtt. Meðan vit gróvu úr bólinum við henda slætta, fór hann at kava av møkum. Flykrurnar løgdu seg allastaðni og huldu allar tær syndir, ið høvdu fest seg í bygdafólkið síðstu nátt. Her á Kálvaslætta var tað seyðaslóðirnar, ið kámaðust burtur av snjósóljunum úr tí djúpu rúmd.. Hugsast kann, at seyðurin kendi á sær, at nú vóru jól, og høvdu teir saknað sópingina til jóla, men betur seint enn aldri. Teirra jólahugni var eitt sindur seinri enn aðrastaðni.

Arnold helt, at hann skuldi fara oman í bispagarðin at gera ein temunn til okkum báðar og bað meg grava úr teimum bólunum, sum eftir vóru. Hann var eitt sindur bangin fyri, at landnyrðingurin gjørdi seg stóran, og møguliga fór hann bresta á við kavaroki av somu ætt. Ein heitan temunn máttu vit hava, áðrenn vit tóku okkum niðanfráaftur. Primussur var í hesi smáttu, og var tað mangan, hann hevði sjóðað undir bitunum í hesi tignarliga skýli. Tað var besti temuður, ið fáast kundi í heimsins minsta bispagarði, sum hoyrdi til veraldar størsta katedrali.

Arnold gav seg oman ímóti Kjógalágni, yvir ímóti rættini og hvarv inn í hetta fitta, lítla húsið. Eg fór mína leið Undir oynna og Líðarbrúgv og gróv út úr bólunum, sum hoyrdu til henda partin av haganum. Temuðurin í huganum gav einum styrki at grava og gera skjótt av.

Flykrurnar vóru sum prikkarnir í myndunum hjá Georges Seurat, serliga í myndini: Sunnudag seinrapart á oynni La Grande Jatte. Kalsoyggin var nú vorðin til eina impressionistiska mynd við Kallinum og Borgarnum sum hábærsligar høggmyndir júst sum fólkini í myndunum hjá hesum impressionistiska málara Seurat.. Alt var ein umbroyting í hesum flykrudansi. Ikki vart tú sørt sjálvur umbroyttur. Bólini vórðu grivin og lættur vart tú um hjartað, tá ið leiðin lá oman við Kjógalágni. Nú kundi seyðurin søkja sær skjól í einum ruddiligum bóli um ikki annað millum jól og nýggjár.

Ljósið setti seg á Róvuna, Góðadalstind og Mjóstýggj. Í Ovaru - og Niðaru tjúkkurð stóð urðargrótið vælfjøggað. Kavabjálvin rakk niður á øklar, og tað ódrúgva ljósið um hesa árstíðina nam við eggina, fór fram við Skammrókum og Mosarókum og datt niður á Kálvaslætta, har tað hvarv í tí foyma kavanum.

Eyguni leitaðu sær yvir á Kalsoynna í Bugin í Á (Buniá). Har stendur ein steinur í hesum dali, og rópa fuglfirðingar hann fyri Sólsetursteinin. Um sumrarnar, tá ið fólk vóru burtur í torvi á Góðadali, brúktu tey steinin til tíðarmerking. Tá ið sólarskuggin á hásumri rakk henda stein, var tíð at taka seg niðanfrá og leita at húsum. Klokkan var tá hálvgum átta. Tá ið komið varð niðan í Ryskihjalla, settu tey seg, og var hetta rópt uppi í Setrinum, har ein kelda er og altíð ein koppur lá, og fingu tey sær ein vatnsopa, meðan tey rindaðu møðina og litu yvir dalin og Norðoyggjar. Tá var sólarljósið menskari enn um jóltíðir, og kom tað væl við at leska sær í kelduvatni, sum sprikti upp úr jørðini svalligt og reint.

Tað var ringt at fáa eyga á Sólsetursteinin´, nú flykrurnar vóru so tættar og temuðurin lá so frammarliga í huganum. Nei, nú mátti farast oman til rættina og inn á gólvið hjá Arnoldi, heimsins besta røktingarmanni í heimsins minsta bispagarði. Umbroytingin, sum fekk tak á mær á Kálvaslætta, mentist bara nærri komið varð at bispagarðinum. Eitt sjáldsamt ljós sást stava niður yvir ta kavaklæddu tekjuna í hesum fitta húsi. Hetta ljós er bara til skjals í málningum og er hetta listamonnum rós verdugt at mála sovorðnar ljóssseilur.

Gnígjgjaði mær um eyguni og trúði ikki mínum egnu eygum. Ljósið bara mentist. Lognbrá ella ein hvørvisjón kundi hetta ikki vera, tí hetta var so tætt hjá, og sást tað ikki ímóti havsbrúnni. Fet fyri fet komst tú nærri tí skínandi ljósinum. Tað var einki yvir at dylja, at hetta ljós var av eini aðrari verð, mundi tað vera tað sama ljósið, sum skein í myrkrinum yvir Bethlehems fløtur, ella var hetta eitt serligt Góðadalsljós, sum var her og eingin hevði sæð áður? Ja, mangt er forborgið og kanska serliga triðja jóladag.

Kom at durinum og stóð og skimaðist. Tað var næstan sum á alljósum degi. Rættini hevði Arnold grivið út úr, so har var einki at gera enn at taka í klinkubandið og fara inn í henda tignarliga bispagarð og seta seg niður at og fáa sær ein góðan duss. Kavafómin lá so tjúkkur á tekjuni og lavaði av takskegginum.

Varliga varð latið upp .. hugsaði um sálmin hjá Brorson: Tolin bíða, trongdir líða, sum Janus týddi. Gloppast eitt sindur steingjandi grindir, steingjandi grindir, tá gerst tú glað. Ivaðist onga løtu í, at eg fór at síggja Jósef, Mariu og Jesusbarnið í eini krubbu, so nógv fór um meg, tá ið eg tók í klinkubandið, men kanska átti tú bert at gloppa hurðini og hugt inn, ja, bara eg sá faldin á klæðunum hjá Jósefi og Mariu og hoyrt andadráttin frá Jesubarninum, tað var nóg mikið: Gloppast eitt sindur.., murraði lagið, og so fór eg undir at syngja henda fræga sálm: Tolin bíða, trongdir líða, trongdir líða við dapri lund…. og so varð trinið inn um gátt.

Jósef sat uppi yvir Mariu og Jesubarninum, og mitt ímillum tey sat Arnold vælhýrdur við vindli í munnvikanum og helt dampin uppi á primussinum. Keppurin var sum keppar flest ein føroyskur skulpturur, sum Jósef og Maria valla kendust við, men Jesubarnið smíltist við sínum blíða brosi um alt ennið. Vart tú hattleysur, bar suðurlendskan búna ella var undir kolli, kundi gera Jesusi tað sama. Nei, hann gjørdi ikki mun á einum lærara ella einum arbeiðara ella Jósefi, Mariu og einum røktingarmanni.

Smáttan, sum dagliga sá eitt sindur karlagin út, var hesa stund fjálg og hugnalig. Gosið stóð út úr tútinum á tí stóra skipsketlinum, og legði eina gloriu kring høvdið á skyldmanninum. Osin vavdi seg inn í tað fáliga vetrarljósið og gjørdi, at tinnuljósið frá teimum friðarligu flykrunum fór at leiftra á ein serligan hátt. Annaðleiðis fór tað ikki at vera, tá ið sjálvur dráttur alra drátta var komin inn á gólvið í eina smáttu á Góðadali triðja jóladag 1983.

Seint verður hesin temuður gloymdur, og skyldmaðurin spurdi so vælhýrdur, hvat eg hevði sæð? Hann hugsaði sjálvandi um seyðin. - Sæð? Eg havi sæð Jósef, Mariu og Jesubarnið. – Hvar? – Tey sótu her, tá ið eg kom inn!- Eitt suð fór ígjøgnum Dalin og ein ljómandi rødd hoyrdist fjallanna millum. Tykkum er í dag…. Okkurt var, sum var útyvir tað vanliga. – Ja, eg kendi tað á mær, at her var ein forsjón av himmalskum anda, tá ið eg sá teg stíga inn um gáttina. Tað sangin…..

Arnold helti gott te upp í krússið, sum hevði hingið í fleiri ár undir bitunum í smáttuni. Vit søgdu ikki nógv, men hugsaðu mest um tað, sum hevði fyrifarist okkum. Arnold segði mangan: Mín meining er tann, nú sigi eg einki. Ofta er tað so, at kvirran er tann besta talan.

Runið við sjóvarmálan í Smørgjógv skamt ífrá fylgdi okkum við sínum hulisliga ljóði, tá ið vit tóku okkum niðanfrá. Hetta er besta jólaløta, eg havi upplivað mín livandi dag, triðja jóladag 1983.

Fjallmenn várið 1986